**FISKIMÁLASTÝRIÐ**
FISKIVINNUSTOVAN

**Tórshavn, tann 31. maj 2001**
**J.Nr.: 20000342-29 / 140**
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt: AK**

**Tygara skriv**

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Postrúm 208
110 Tórshavn

Víst verður til skriv tykkara til Jørgen Niclasen, landsstýrismann dagfest 9. mai 2001 – tykkara j. nr. 7.13.20000003[19]ks/td – har biðið verður um upplýsingar viðvíkjandi ávísum viðurskiftum, í sambandi við at útlendsk skip hava fingið loyvi at fiska tunfisk í føroyskum sjógvi.

Í hesum sambandi skal verða sagt frá, at Fiskimálastýrið hevur fingið hjálagda skriv frá Sp/f Far-Nipp, Sandavágur sum svar upp á fyrispurningin frá landsstýrismálanevndini.

Svarið frá Sp/f Far-Nipp verður hervið sent landsstýrismálanevndini.

Vinarlig heilsan

Andras Kristiansen

-1. JUN. 2001

Løgtingið j. nr. 7.13.20000003[21]

YVIRI VIÐ STRÖND 17 - 19 • POSTSMOGA 347 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 30 30 • TELEFAX 35 30 35
E-MAIL: FISK@FISK.FL.FO

**FAR-NIPP Sp/F**

FO-360 Sandavágur, Faroe Islands
Telephone +298 32 11 55 and +298 31 07 50
Telefax +298 32 11 56

30. maj 2001

FISKIMÁLASTÝRIÐ
Yviri við Strond 17-19
P. O. Box 347
FO-110 Tórshavn

**Att.: Andras Kristiansen**

Vísandi til skriv Fiskimálastýrisins, dagfest 15. Maj 2001, J. Nr. 20000342-23 / 140, verður, eftir áheitan frá landsstýrismálanevndini, biðji um at fáa upplýsingar frá teimum føroysku feløgum, sum hava luttikið í royndarveiðu eftir tunfiski í føroyskum sjógvi í samstarvi við útlendsk feløg, *"um tey hava fingið nakra samsýning frá útlendsku skipunum/feløgunum í sambandi við, at royndarloyvi vórðu givin."* Eitt av hesum feløgum er Sp/F Far-Nipp.

Fyrst fara vit at biðja tykkum halda okkum til góðar, at vit ikki hava svara skrivi Fiskimálastýrisins fyrrenn nú. Vit hava umhugsa henda spurning gjølliga, tí soleiðis sum hann er orðaður meta vit at hann kann skiljast uppá tveir mátar.

Tann fyrri mátin vit meta at spurningurin kann skiljast sum er, um felag okkara hevur fingið eina ella aðra samsýning fyri at útvega einum útlendskum skipið eitt royndarloyvi - t.v.s. eitt ella annað slag av kommisión sum millummaður.

Tann seinni hátturin ið vit meta at spurningurin kann skiljast sum er, um felagið á ein ella annan hátt hevur fingið inntøkur ið stava frá veiðuni hjá útlendska skipinum.

Vit fara tí at biðja um at fáa meira nágreiniliga at vita hvussu settl spurningurin skal skiljast, tí eftir okkara fatan er stórur munur á teim báðum omanfyrinevndu tulkingum okkara av spurninginum og hvat svar vit kunnu geva uppá spurningin.

Vinarliga

Jákup Egholm Hansen

FISKIMÁLASTÝRIÐ
30. MAJ 2001
J. NR. 20000342/28-140